# IKKI TIL AT KENNA AFTUR



**BROYTINGAR** - Eg hevði aldrin ímyndað mær, at tað fór at blíva eitt slíkt virksemi her á Hálsi. Alt er fullkomuliga broytt - frá eini stórari vídd við óspiltum haga, til eitt øki við eini rúgvu av handlum og fyritøkum. Jú, fá ár kunnu broyta eitt øki ótrúliga nógv, sigur havnarmaðurin, Torkil Johannesen sum hevur upplivað menningina á Hálsi frá barnaheimi hansara. - Økið er ikki til at kenna aftur, nú fuglaljóðið og friðurin annars, eru broytt til ljóðið av bilum og handilsligum virksemi.

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Á Hálsi:** - Tað er løgið at hugsa aftur á: Eg vaks upp her, við Hoyvíksvegnum sum míni "barndommens gade". Vit lógu so langt burtur frá miðbýnum í Havn og øllum virkseminum har, at vit nærum livdu okkara egna lív.

- Ja, mítt barnaheim lá soleiðis fyri, at tað minti mest um eina bygd við bert einum húsi, ið lá tætt við Havnina, vísir 50 ára gamli Torkil á. - Og hygg so, hvussu tað liggur í dag, - umgirt av stórum bygningum.

Stóra økið á Hálsi lá í mangar mátar órørt heilt fram til 70'árini, men so kom brádliga ferð á við byggingini av stórum bygningum og nógvum virksemi.

Ein avleiðing av hesum var, at sethúsini sum pápi hansara, Jógvan, sjálvur bygdi, komu at standa sum púra einsamøll sethús á einum stórum vinnuligum øki.

- Leif Mohr keypti húsini í byrjanini av 80'unum, og var ætlanin helst at ríva tey niður. Men tíbetur fyri okkum systkin, standa tey enn í dag, og teir eru eisini óførir at halda tey viðlíka, greiðir Torkil frá.

Torkil hevur í fleiri ár búð heilt í hinum endanum av býnum, úti á Norðasta Horni, men er nú fluttur nærri miðbýnum, og býr í Dalakróki.

### Sjáldsamir gestir

Tá Torkil við millumbilum koyrir eftir Hoyvíksvegnum, kann hann ikki á nakran hátt samanberast við hansara "barndommens gade": Frá at hava verið eitt bert og oyðið øki, er tað í dag merkt av lívi og vinnuligum virksemi í dagstímunum.

**»** Mítt barnaheim lá soleiðis fyri, at tað minti mest um eina bygd við bert einum húsi, ið lá tætt við Havnina. Og hygg so, hvussu tað liggur í dag, umgirt av stórum bygningum

Økið á Hálsi var sjálvandi eitt øðrvísi stað fyri fimmti árum síðani, tá Torkil vaks upp her. Ella sum Torkil tekur til: - Ja, vit lógu púra avskorin frá fólki, heilt burtur frá øllum, - ja, faktist har sum vegurin endaði.

Nakað tættari ímóti býnum lá eitt stoypivirki, har sum dekkverkstaðið nú liggur, og har nógv virksemi var. Og longri uppi lá veðurstøðin.

- Tað ljóðar ótrúligt, men tað var sera sjáldan at fremmandafólk kom niðan hendavegin. Tað var soleiðis, at tey sum endiliga komu niðan, tey legði man merki til, greiðir Torkil frá.

Teir vóru fleiri traðarmenn, sum høvdu traðir sínar í økinum, og sum dagliga gingu niðan fyri at geva seyði, hønum og gæsum sínum, meðan onkur gekk eftir vegnum við tráðu í hond, tí hann skuldi á seiðaberg við Boðanes.

### Við stavi í hond

Ein teirra sum hevði sína dagligu gongd framvið barnaheimi hansara, var Olaf á Lava. Hann hevði eitt serstakt gongulag, sum festi seg í minnið á tí unga Torkili.

- Hann hevði altíð stav við. Tá Olaf gekk, svingaði hann stavin runt og slóð hann niður í jørðina. Tað var so friðarligt, at tað hoyrdist tá hann kom.

- Ein annar sum somuleiðis koyrdi framvið hjá okkum var gubbi Torkil, Regin Olsen, sum andaðist í farna mánaði. Hann arbeiddi á Veðurstøðini og koyrdi til arbeiðis í bili, og eg kendi ljóðið á bilinum og visti tí, nær Regin fór til arbeiðis og nær hann fór til hús aftur.

Við sínum vandna oyra dugdi Torkil eisini á at skyna, um onkur fremmandur bilur koyrdi framvið. Var tað so, leyp hann í vindeygað fyri at vita, hvør hesin bilurin mundi vera.

Úr vindeyganum hevði hann somuleiðis eitt sera gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð, og skapti hetta eisini ein áhuga fyri skipum.

- Eg og ein beiggi mín, Bjarki, plagdu at kika eftir skipum í Nólsoyarfirði fyri at finna útav, hvørji tey vóru. Eg minnist at vit sóu nógvar eingilskar og russiskar trolarar, sum uttan iva troláðu tætt undir landi. Hetta brúktu vit nógva tíð uppá og høvdu mikla gleði av tí.

- Tja, eg veit ikki hvør ungur havnarmaður ger slíkt í dag. Men vit høvdu ikki so nógv annað at gera, og tí funnu vit uppá alt hetta ymiska, sigur Torkil við einum brosi.